tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 29.09.2025 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Barbara Michalina Tausen, Bjarni Hammer, Eyð Jóna Eidesgaard, Arnfinn Bech

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 61/25 | 25/00446-1 | Fíggjarætlan 2026 |
| 62/25 | 20/00392-1 | Føroya Eftirskúli -leigusáttmálið av Sjógøtu 2, til undirvísing |
| 63/25 | 25/00236-2 | Blái krossur -umsókn um stuðul til Títt-Rúm |
| 64/25 | 25/00292-1 | Tvøroyrar Bygda og Sjóvinnusavn -umsókn um stuðul 2025 |
| 65/25 | 25/00365-3 | Siðsøgulig lýsing av Tvøroyri -jólini 2025 |
| 66/25 | 24/00234-1 | Eldrafimleikur á SER |
| 67/25 | 25/00418-1 | P/F Varðin Pelagic -"dagføring sep. 2025" av avtala um uppfylt sjóøkið til protein & lýsiverksmiðju |
| 68/25 | 25/00455-1 | Jólaborðhald 2025 |
| 69/25 | 25/00459-1 | Føroya Banki -dagføringar av partinum sum Føroya Banki leigar á matr.nr 374, á Sjógøtu 2, samsv. keypsavtalu (25/00135-7) |
| 70/25 | 25/00433-1 | Læknamiðstøðin -dagføring/nýtt inbúgv |
| **Til kunningar** | | |
| 23/25 | 25/00029-1 | Skattainntøkur 2025 |
| 24/25 | 25/00189-1 | TVK -endurskoðan av lánum hjá Tvøroyrar kommunu |

| | | |
|---|---|---|
| 25/25 | 25/00419-3 | Djóralækni -SP.F tín Djóralækni søkir um hølir |
| 26/25 | 25/00450-1 | Kunningarferð til Noregs - oktober 2025 |
| | | |

**Skrá og viðmerkingar til hesa:**
Kristin Michelsen, borgarstjóri lesur skránna til fundin í dag og spyr um viðmerkingar eru til skránna – Eydis Eidesgaard viðmerkir, at hon ikki hevur verið við til viðgerðina av mál 67/25.

**Til støðutakan**

## 61/25
## 25/00446-1 Fíggjarætlan 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 76/25 |
| 2 Býráðið | 29.09.2025 | 61/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 18.09.2025**

Sambært kommunustýrislógini skal Fíggjarnevndin í seinasta lagi 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

Býráðið skal síðani viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili, og fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Tvøroyrar býráð hevur ásett, at fyrsta viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2026 verður 29. september 2025, og onnur/endalig viðgerð verður áðrenn 1. desember 2025.

Tað eru tveir temadagar settir av til fíggjarætlanararbeiðið, har býráðslimir saman við umsiting viðgera rakstur og íløgur. Hesir eru tórsdagin 16. oktober og fríggjadagin 17. oktober, har raksturin og íløgurnar fyri 2026 verða gjøgnumgingin.

**Lýsing av málinum**
Í uppskotinum til fíggjarætlan 2026 er roknað við, at kommunuskattaprosentið og barnafrádrátturin framhaldandi verða ávikavist 20,9% og 8.000 kr.

Fortreytirnar í uppskotinum eru, at rakstrarútreiðslur kunnu einans hækka, um talan er um:
- lógarbundin krøv,
- býráðssamtyktir, íroknað virksemisbroytingar sum fylgja av nýggjum íløgum,
- sáttmálabroytingar og líknandi.

**Viðgerðarætlan**
Mælt verður til, at fíggjarætlanin fyri 2026 verður viðgjørd soleiðis:
1. **29. september 2025**: 1. viðgerð av fíggjarætlanini, har ásett verður barnafrádráttur, skattaprosent, rakstur og íløguætlanir fyri 2026.
2. **Temadagar 16. oktober og fríggjadagin 17. oktober**, har raksturin og íløgurnar fyri 2026 verða gjøgnumgingin
3. **Áðrenn 1. desember 2025**: 2. viðgerð og endalig samtykt av fíggjarætlanini.

**Inntøkur:**
Inntøkurnar komandi ár eru mettar til knappar **kr. 73 mió.** Tær hava støði í uppgerðum, sum FMR og Taks sendu út fyrst í september, og lønarvøkstur á arbeiðsmarknaðinum.

**Lyklatøl (metingar)**

- Skattainntøkur fyri 2026: **Kr. 72.968.322,-**
  *(Skattainntøkur fyri 2025: kr. 69.908.177,-)*

*Hetta grunda á ein kommunuskatta á 20,9% og eftir barnafrádrátt á kr. -8.000,-*

**Fólkatal aug. 2024/2025: 1759/1734** ***(-25)***

Fólkatalið í Tvøroyrar kommunu er minkað seinasta árið. Í august 2024 búðu 1.759 fólk í kommununi, men í august 2025 var talið fallið niður á 1.734. Tað svarar til ein minking upp á 25 fólk – ella umleið 1,4 %.

Samstundis er samlaða fólkatalið í Føroyum vaksið. Í august 2024 búðu 54.769 fólk í landinum, og í august 2025 var talið komið upp á 55.146. Tað merkir ein vøkstur upp á 377 fólk – ein øking á umleið 0,7 %.

Í Tvøroyrar kommunu búðu í aug. 2024 umleið 3,2 % av samlaða fólkatalinum í Føroyum, men hetta lutfallið var í aug. 2025 lækkað til umleið 3,1 %.
*(Sí viðheftu tabellir)*

Skattagrundarlag:

- A-inntøka: kr. 386.747.930,-
- B-inntøka: kr. 18.626.700,-
- FAS-inntøka: kr. -6.298.957,-
- Inntøkufrádráttur: kr. -329.589,-
- Sjómannafrádráttur: kr. -1.284.613,-
- Botnfrádráttur: kr. -40.160.800,-

Kommunalt skattagrundarlag: kr. 363.599.628,-

- Kommunuskattur (20,9%): kr. 75.992.322,-
- Barnafrádráttur (378 x 8.000 kr.): kr. -3.024.000,-
  *(Børn 2025: 386)*

Nettoskuldin í mun til álíkning var við árslok 2024, 34% av einari álíkning. Láni møguleikarnir hjá kommununi vóru tískil við árslok 2024 umleið 73 mió. kr.

Samlað skuld í mun til álíkning
Niðanfyri er eitt yvirlit yvir nettoskuld í mun til álíkning:

| **Gongd útjavningarkonto/nettoskuld og lániloft árini 2020 - 2024** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **2024** | **2023** | **2022** | **2021** | **2020** |
| ***Útjavningarkonto/nettosskuld*** | ***38.258*** | ***36.955*** | ***38.156*** | ***35.850*** | ***36.815*** |
| ***Lániloft (nýggja) t.kr.*** | | | | | |
| Kommunuskattur inntøka | 75.954 | 72.935 | 71.223 | 67.967 | 65.571 |
| Kommunuskatta % | 20,9% | 20,90% | 20,90% | 20,90% | 20,90% |
| ***Álíkning umroknað 23%*** | ***83.586*** | ***80.263*** | ***78.379*** | ***74.796*** | ***72.159*** |
| Skattur eftirlønargjald | 23.207 | 21.049 | 0 | 0 | 0 |
| Afturbering DIS, FAS o.a. | 4.845 | 4.895 | 0 | 0 | 0 |
| ***Lániloft (nýggja) t.kr.*** | ***111.638*** | ***106.207*** | ***78.379*** | ***74.796*** | ***72.159*** |
| ***Nettoskuld %*** | ***34%*** | ***35%*** | ***49%*** | ***48%*** | ***51%*** |
| ***Lánimøguleikar*** | **73.380** | **69.253** | **40.224** | **38.946** | **35.344** |

Álíknaður skattur og nettoskuld eru roknað út eftir leiðreglum hjá Fíggjarmálaráðnum. Í 2023 blivu reglurnar viðvíkjandi útrokning av nettoskuld í mun til álíkning broyttar, soleiðis at frameftir eisini verður tikið hædd fyri tí, sum kommunan fær viðvíkjandi skatti av eftirlønargjøldum og afturbering av DIS, FAS o.a.

Nettoskuldin í mun til álíkning er við árslok 2024 34% av einari álíkning. Lánimøguleikarnir hjá kommununi eru tískil við árslok 2024 umleið kr. 73. mió.

**Tvøroyrar kommuna hevur í inniverandi ári upptikið lán á 15 mió, til ma. keypa og dagføringar av bygninginum á Sjógøtu 2-4.**

**Yvirlit fyri rakstrarroknskap seinastu 5 árini**

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir inntøkurnar síðstu 5 árini:

| *(1.000 kr.)* | **FÆ2026** | **2024** | **2023** | **2022** | **2021** | **2020** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Roknskapur | (2025) | 78.997 | 75.556 | 74.256 | 70.020 | 68.315 | |
| Ætlan | 72.968 | 68.510 | 70.469 | 65.581 | 64.380 | 61.572 | |
| Munur | | 10.487 | 5.087 | 8.675 | 5.640 | 6.743 | |
| Skattaprosent | | 20,9% | 20,90% | 20,90% | 20,90% | 20,90% | |
| | | | | | | | |
| Manntal | 1.734 | 1.732 | 1.747 | 1.767 | 1.771 | 1.747 | |
| Inntøka pr. fólk | 43,7 | 45,6 | 43,2 | 42 | 39,5 | 39,1 | |
| | | | | | | | |
| Inntøka umroknað til skattskyldug | | 377.976 | 361.512 | 355.292 | 335.024 | 326.866 | |
| Inntøka pr. fólk | | 218 | 207 | 201 | 189 | 187 | |
| Broyting í árinum | | 5,46% | 2,92% | 6,29% | 1,11% | 4,79% | |

**Lógargrundarlag** -*Kommunustýrislógin*
§ 39. Fíggjarárið er frá 1. januar til 31. desember. Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið.
Stk. 2. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember

**Fíggjarligar avleiðingar**
Fíggjarætlanin er grundarlagið undir rakstri og íløgum hjá Tvøroyrar kommunu fyri 2026.

**Tilmælið**
Uppskot til fíggjarkarm fyri 2026 verður hervið lagt fyri fíggjarnevnd og býráð til støðutakan

Fíggjarleiðarin og kommunustjórin mæla býráðnum – umvegis Fíggjarnevndina – til at:

1. Áseta skattaprosent og barnafrádrátt galdandi fyri fíggjarárið 2026.

2. At nevndirnar viðgera hvør í sær á nevndarfundi í oktober ynskir til fíggjarætlanina fyri 2026. Hesi ynskir verða síðani viðgjørd á felags temadegi 16.–17. oktober, har seinasta hond verður løgd á raksturin og íløgurnar fyri 2026.

3. Onnur og endaliga viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2026 verður løgd fyri býráðið til samtyktar í seinasta lagi 1. desember 2025.

**Fíggjarnevndin 26. september 2025:**
Fíggjarnevndin hevur gjøgnumgingið uppskot til fíggjarætlan fyri 2026, og tekur einmælt undir við fyriliggjandi uppskotið. Fíggjarnevndin mælir til at skattaprosentið verður 20,9% og at barnafrádrátturin verður kr. 8.000,- eins og undanfarna ár. -Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 29. september 2025:**
Býráðið samtykkir einmælt við fyrstu viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2026 at áseta kommunuskattin til 20,9% og barnafrádráttin til kr. 8.000,- eins og undanfarna ár. Harumframt varð avgjørt, at temadagar verða í býráðssalinum á Tvørávegi 37 tann 16.–17. oktober, har býráðslimir og leiðandi starvsfólk í umsitingini áseta játtanir til rakstur og íløgur fyri 2026. Onnur viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2026 verður løgd fyri býráðið tann 27. november 2025.

**62/25**
**20/00392-1 Føroya Eftirskúli -leigusáttmálið av Sjógøtu 2, til undirvísing**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 3 Fíggjarnevndin | 20.03.2025 | 30/25 |
| 4 Býráðið | 31.03.2025 | 10/25 |
| 5 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 78/25 |
| 6 Býráðið | 29.09.2025 | 62/25 |

**Kommunustjórin 10. desember 2020.**
Umsitingin hevur móttikið umsókn frá skulastjóranum á Føroya Eftirskúla, um leingjan av leigusáttmálanum millum Tvøroyrar kommunu og Føroya Eftirskúla, av bygninginum á matr.nr 374, Sjógøta 2 á Tvøroyri, at brúk til undirvísing.

Galdandi sáttmálin, ið er undirskrivaður 19. august 2020, gongur frá 1. juni 2020 til 31. mai 2021, og søkt verður um at leingja henda fram til 31. mai 2023. -Samb. §3 í sáttmálanum kann leigarin søkja um leingjan av leigumálinum í upp til 36 mánaðir.

Mælt verður til at ganga umsóknini á møti, og at leigusáttmálin verður eins orðaður, við undantøku av §3, ið fær niðanfyri broyting:

> *§3 Longd leigumálsins: Leigumálið byrjar tann 1/6-2020, og er galdandi fram til 31/5-2023. Eigarin kann ikki siga leigusáttmálan upp fyrr enn 31/5-2023, og tá við freist uppá 3 mánaðir. Tó kann eigarin siga leigumálið upp við 1. mánaði freist um leigarin ikki lúkar krøvini í leigusáttmálanum. Leigarin kann siga sáttmálan upp við freist uppá 3 mánaðir, um viðurskiftini broytast somikið, at leigarin ikki longur hevur tørv á hølinum.*

**Fíggjarnevndin 18. december 2020:**
Einmælt samtykt

**Býráðið 21. december 2020:**
Einmælt samtykt

**Kommunustjórin 25.02.2025:**
Nú Tvøroyrar kommuna hevur keypt allan bygningin á Sjógøtu 2, við ætlan um at flyta umsitingina hjá kommununi í bygningin, verður mælt til at uppsiga leigusáttmálan, sum Tvøroyrar kommuna hevur við Føroya Eftirskúla av bygninginum á Sjógøtu 2. Mælt verður til, at uppsagnartíðin verður 3. mðr. samsv. §3 í leigusáttmálanum, sum merkir, at Føroya Eftirskúli skal verður fluttir úr bygninginum 30. juni. 2025.

Upplýsast skal at s*tjórin og forkv. í stýrinum fyri Føroya Eftirskúla blivu kunnaði um hesa ætlanina á fundi við fíggjarnevndina hjá Tvøroyrar kommunu hin 24. feb. 2025. Tey tóku kunningina til eftirtektar og skuldi kanna hvørji onnur hølir vóru, sum kunna hýsa Føroya Eftirskúla.*

**<u>Fíggjarnevndin 20. marts 2025:</u>**
Fíggjarnevndin mælir til at uppsiga leigusáttmálan við Føroya Eftirskúla samsv. leigusáttmálan, og mælir sam,stundis til, at umsitingin arbeiðir saman við skúlaleiðsluni at finna onnur hóskandi hølir til Føroya Eftirskúla.

**<u>Býráðið 31. marts 2025:</u>**
Borgarstjórin mælir til, at býráðið samtykkir tilmælið hjá fíggjarnevndini, um at uppsiga leigusáttmálan millum Tvøroyrar kommunu og Føroya Eftirskúla, og at umsitingin arbeiðir saman við skúlaleiðsluni at finna onnur hóskandi hølir til Føroya Eftirskúla.

Fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Barbara Michalina Tausen, Bjarni Hammer, Eyð Eidesgaard
Ímoti er: Ongin
Blankt: Arnfinn Bech

**<u>Kommunustjórin 05.09.2025:</u>**
Umsitingin hevur havt samskifti við stjóran og nevndarlimir hjá Føroya Eftirskúla (FE) um virksemið hjá skúlanum, m.a. við atliti til uppsagnarskrivið frá Tvøroyrar kommunu um leigu av Sjógøtu 2. Partarnir eru komnir ásamt um, at Føroya Eftirskúli fær tilboð um innivist í einari skúlastovu í Tvøroyrar skúla til telduundirvísingina Gaming, og at FE fær tíðaravmarkaða innivist í PH4 til undirvísing samsvarandi viðhefta leigusáttmála.

Tvøroyrar kommuna harmast – saman við stjóranum – um, at skúlin framvegis ikki hevur megnað at fáa fastan bústað til skúla og næmingar. Skúlastjórin hjá FE vóna, at hetta verður avgreitt í komandi fíggjarári.

Mælt verður tí til at samtykkja fyriliggjandi leiguavtalu um PH4.
**<u>Kommunustjórin 05.09.2025:</u>**
Umsitingin hevur havt samskifti við stjóran og nevndarlimir hjá Føroya Eftirskúla (FE) um virksemið hjá skúlanum, m.a. við atliti til uppsagnarskrivið frá Tvøroyrar kommunu um leigu av Sjógøtu 2. Partarnir eru komnir ásamt um, at Føroya Eftirskúli fær tilboð um innivist í einari skúlastovu í Tvøroyrar skúla til telduundirvísingina Gaming, og at FE fær tíðaravmarkaða innivist í PH4 til undirvísing samsvarandi viðhefta leigusáttmála.

Tvøroyrar kommuna harmast – saman við stjóranum – um, at skúlin framvegis ikki hevur megnað at fáa fastan bústað til skúla og næmingar. Skúlastjórin hjá FE vóna, at hetta verður avgreitt í komandi fíggjarári.

Mælt verður tí til at samtykkja fyriliggjandi leiguavtalu um PH4.

**<u>Fíggjarnevndin 26. september 2025:</u>**
Borgarstjórin mælir til at fíggjarnevndin samtykkir fyriliggjandi leiguavtalu um PH4, tó við undantøkum í §1, at fjóra hæddin ikki verður partur av leiguavtaluni.

**<u>Býráðið 29. september 2025:</u>**
Borgarstjórin mælir til, at býráðið samtykkir tilmælið hjá fíggjarnevndini, um fyriliggjandi leiguavtalu av PH4, tó við undantøkum í §1, at fjóra hæddin ikki verður partur av leiguavtaluni -einmælt samtykt

**63/25**
**25/00236-2 Blái krossur -umsókn um stuðul til TíttRúm**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.06.2025 | 66/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.06.2025 | 72/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 79/25 |
| 4 Býráðið | 29.09.2025 | 63/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 16.06.2025**
Blái Krossur søkir um stuðul til MíttRúm: Umsóknin ljóðar:

> *Blái krossur er byrjaður fast við fyrgingar arbeiði hjá TíttRúm, staðsett á Tvøroyari.*
> *Ein er sett í starv frá 1. mai 2025.*
> *Í samband við at vit koma at hava fast virksemi í húsunum á Tvøroyari, skulu ábøtur gerast uttan og innan.*
> *Her er nakað av tí sum gerast skal.*
> *Skifta úthurð, øllum førum eitt vindeyga má skiftast, skifta øll gólvini, keypa okkurt innbúgv, keypa nýggjan ovn (gera av og á okkurt gott til børnini). Eisini skulu húsini og alt tilhoyr málast.*
> *Vit fyngu játtað meira pening frá Løgtinginum, so vit nú fingu møguleika veruliga at kunnu gera mun í Suðuroy eisini. Ynskja at røkka út til øll í landinum, eisini børn og ung og familjur í Suðuroy.*
> *Vilja søkja Tvøroyrar kommunu um ein stuðul í samband við at vit gera ábøtur.*

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Mælt verður til at fíggja møguligan stuðul av FÆ2025, §522, stuðul til mentan

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 18. juni 2025:**
Forkv. og Anita Vibergsdóttir mæla til at stuðla Bláa Kross við kr. 50.000,- til takið TíttRúm. Bjarni Hammer tekur støða á býráðsfundinum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2025:**
Borgarstjórin hevur avtala fund við forkv. í Bláa Kross Edva Jacobsen um ætlanir hjá Bláa Kross. Einmælt samtykt at útseta málið til eftir henda fundin.

**Fíggjarnevndin 26. september 2025:**
Borgarstjórin mælir fíggjarnevndini til at samtykkja tilmælið hjá mentanarnevndini, at stuðla Bláa Kross við kr. 50.000,- til «Títt Rúm», sum verður handa á móttøku 20. oktober í hølinum hjá Bláa Krossi á Tvøroyri. -Einmælt samtykt, málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 29. september 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini, at stuðla Bláa Kross við kr. 50.000,- til «Títt Rúm», sum verður handa á móttøku 20. oktober í hølinum hjá Bláa Krossi á Tvøroyri.

## 64/25
## 25/00292-1 Tvøroyrar Bygda og Sjóvinnusavn -umsókn um stuðul 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 25.08.2025 | 71/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 85/25 |
| 3 Býráðið | 29.09.2025 | 64/25 |

**Málslýsing:** Kommunustjórin 12. aug. 2025
Nevndarform. fyri Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn søkir um at fáa útgoldið stuðulsjáttan til raksturin av savninum.

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúðin og Løgtingslóg um bygdasøvn við mentunarsøguligum týdningi, sum broytt við løgtingslóg nr. 88 frá 17. juli 1986

**Fíggjarligar avleiðingar:** Tvøroyrar kommuna hevur á Fíggjarætlan fyri ár 2025 játta stuðul á kr. 325.000,- til Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn. -Rakstrarkonti §528 Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn útgreina: (Játta í alt FÆ2024 kr. 325.000,-)

Býti av stuðulsupphædd undanfarin ár:
- *Rakstur av bygningum og hølum: kr. 50.000,-*
- *Lønir til starvsfólk: 175.000,-*
- *Umvælingar: kr. 100.000,- (Krevur útgreining/skjalprógv fyri umvæling)*

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 25. august 2025:**
Einmælt samtykt at veita Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn stuðul á kr. 325.000,-
Býti av stuðulsupphæddini verður sum niðanfyri:
- *Rakstur av bygningum og hølum: kr. 50.000,-*
- *Lønir til starvsfólk: 175.000,-*
- *Umvælingar: kr. 100.000,- (Krevur útgreining/skjalprógv fyri umvæling)*

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. september 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Mentanarnevndini at veita Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn stuðul á kr. 325.000,-
Býti av stuðulsupphæddini verður sum niðanfyri:
- *Rakstur av bygningum og hølum: kr. 50.000,-*
- *Lønir til starvsfólk: 175.000,-*
- *Umvælingar: kr. 100.000,- (Krevur útgreining/skjalprógv fyri umvæling)*

**Býráðið 29. september 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini at veita Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn stuðul á kr. 325.000,-
Býti av stuðulsupphæddini verður sum niðanfyri:

- *Rakstur av bygningum og hølum: kr. 50.000,-*
- *Lønir til starvsfólk: 175.000,-*
- *Umvælingar: kr. 100.000,- (Krevur útgreining/skjalprógv fyri umvæling)*

**65/25**
**25/00365-3 Siðsøgulig lýsing av Tvøroyri -jólini 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 25.08.2025 | 73/25 |
| 2 Mentanarnevndin | 08.09.2025 | 77/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 93/25 |
| 4 Býráðið | 29.09.2025 | 65/25 |

**Málslýsing: kommunustjórin 23.08.2025**
Umsitingin hevur móttikið teldupost frá Siri Andreasen og Johan Simonsen, sum mæla til at Tvøroyrar kommuna skipa fyri Siðsøguligum jólum, eins og varð gjørt í 2022.

**Samanumtøka/niðurstøða av uppskoti frá uppskotsstillarar:**
Í 2022 varð fyriskipað fyri *Siðsøguligum jólum* á Tvøroyri. Tiltakið var væl eydnað og nógv vitjað. Nú er lagt upp til at endurtaka tiltakið í 2025.

Johan Holm Simonsen (JHS) hevur latið uppskot um skipan og innihald.

**Innihald (stutt lýsing):**
- **Faktorhúsini:** tónleikakvøld, jólaheilsur, klaver tónleikur.
- **Krambúðin:** bygdahandil úr 1950–60'unum, søla av heimavirkaðum vørum og góðgæti.
- **Økið aftanfyri Faktorhúsini:** smáttur, jólatrø, hugnalig jólastemning.
- **Doktarahúsið:** framsýning av jólatrøum frá ymiskum tíðarskeiðum.
- **Gestastovan:** møguliga jólamann/nissur.
- **Samstarv:** kirkjan, Dugni, jólamarknaður á Seglloftinum.

**Útreiðslur (høvuðspunkt):**
- Samsýning til JHS *og aðrir veitarar*
- Starvsfólkalønir til Faktorhús og evtl. Krambúð.
- Klaverstemman og samsýning til tónleikarar.
- Innkeyp: príði til jóla (Jólamann/nissur), jólatrø, góðgæti, faldarar, lýsingar og smærri útbúnaður.

**Tilmæli hjá umsitingini**

**Spurningar hjá mentanarnevndini at taka støðu til:**
- Hvussu stóran stuðul og ábyrgd skal kommunan taka á seg?
- Hvørjar uppgávur skulu fyriskipararnir sjálvir røkja?
- Hvussu kann tiltakið gerast afturvendandi og gagnligt fyri býin?

**Umsitingin mælir til:**
Ein endalig støðutakan krevur eitt nágreiniligt yvirlit frá fyriskiparunum um:
- væntaðar útreiðslur,
- ábyrgdarbýti millum fyriskiparar og kommunu,
- manning og dagliga skipan av tiltakinum.

**Yvirorðnað:**
Um mentanarnevndin/býráðið ynskir at skipa fyri *Siðsøguligum jólum 2025*, mælir umsitingin til, at:

- kommunan letur eina oyramerkta stuðulsupphædd til fyriskiparar, at umsita í samráð við starvsfólk á Kunningarstovuni,
- fyriskipararnir (Siri Andreasen og JHS) fáa atgongd til hølini, har tiltøkini skulu vera, nakrar dagar undan tiltøkini byrja,
- fyriskipararnir útvega neyðugt fólk til uppgávur og manning á teimum støðum, har tørvur er.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
FÆ2025, §514, Mentan "Jóansøka, jólatræ o.a." er avsett kr. 839.272,- (*Uppgerð fyri kostnaðin av jóansøkuni 2025 er ikki uppgjørdur)* -Neyðugt kann verða at útvega eykajáttan.

**Tilmælið um nevndarviðgerð:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 25. august 2025:**
Siri Andreasen møtti á fundinum fyri at greiða frá ætlanini at skipa fyri Siðsøguligum jólum 2025 á Tvøroyri. -Einmælt samtykt, at málið verður tikið upp á næsta fundi í sep. har uppskotstillarar møta og greiða nærri frá um mettan kostnaðin av tiltakinum.

**Mentanarnevndin 08. september 2025:**
Kristin Michelsen møtti til málsviðgerðina. Johan Simonsen greiddi nærri frá ætlanini og fór í ein vissan mun niður í smálutir. Í hesum sambandi varð uppskotið hjá Johan Simonsen og Siri Andreasen viðgjørt. Forkv. í mentanarnevndini mælir til at kommunan tekur av tilboðnum frá Johan Simonsen og Siri Andreasen at skipa fyri Siðsøguligum jólum 2025, og at játtanin verður veitt av §514, um neyðugt við eykajáttan. -Einmælt samtykt. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. september 2025:**
Fíggjarnevndin mælir einmælt til at veita fíggjarligan stuðul til Tvøroyrar Bý- og Sjósavn v./ Siri Andreasen, samsvarandi umsókn dagfesta 22. august og kostnaðarmeting dagfesta 22. august, til at skipa fyri *Siðsøguligum Jólum á Tvøroyri* jólini 2025. Fíggjarnevndin mælir til at játta eina stuðulsupphædd á kr. 175.000,-, sum Bý- og Sjósavnið umsitur. Bygda og Sjósavnið skipar fyri øllum viðurskiftum hesum viðvíkjandi, her í at fáa fólk og ítróttarfeløg at hjálpa til, um Bý- og Sjósavnið metir tørvur vera á hesum. Játtanin verður veitt av §522 "Stuðul til Mentan" -Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 29. september 2025:**
Einmælt samtykt at veita fíggjarligan stuðul á kr. 175.000,- til Tvøroyrar Bý- og Sjósavn, sambært umsókn og kostnaðarmeting dagfest 22. august, til at skipa fyri *Siðsøguligum Jólum á Tvøroyri* jóla-høgtíðina 2025. Bý- og Sjósavnið skipar fyri øllum viðurskiftum hesum viðvíkjandi, herundir at fáa fólk og feløg at hjálpa til, um savnið metir tørv vera á tí. Og at játtanin verður veitt av §522 "Stuðul til Mentan".

**66/25**
**24/00234-1 Eldrafimleikur á SER**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 4 Sosiala nevnd | 12.03.2025 | 10/25 |
| 5 Sosiala nevnd | 09.04.2025 | 16/25 |
| 6 Sosiala nevnd | 21.05.2025 | 1/25 |
| 7 Sosiala nevnd | 27.08.2025 | 32/25 |
| 8 Sosiala nevnd | 23.09.2025 | 33/25 |
| 9 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 102/25 |
| 10 Býráðið | 29.09.2025 | 66/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 10.09.2024**
Forkv. í sosialu nevnd ynskir at viðgerða eldrafimleik á SER

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 12. september 2024:**
Sosiala nevnd mælir einmælt til, at umsitingin heitur á BHS um at tænastan *«Møguleiki er hjá borgarum í Suðuroy 65+ at fáa fyribyrgjandi viðlíkahaldsvenjingar»* verður veitt á javnt á sama støði í norðari hálvu, sum verður veitt á Hamragarði. At útbúnaðurin, ið verður nýttur til venjingar er á sama støði og at hesin verður dagførdur, og at títtleikin til venjingar er eins.

**Sosiala nevnd 11. december 2024:**
Sosiala nevnd mælir einmælt til at BHS veitur javnbjóðis tænastur í norðaru hálvu í Suðuroynni til *borgarar 65+, har hesir fáa fyribyrgjandi viðlíkahaldsvenjingar»* sum í sunnaru hálvu. Og at útbúnaðurin, ið verður nýttur til venjingar er á sama støði og at hesin verður dagførdur, og at títtleikin til venjingar er eins. -málið verður beint í býráðið

**Býráðið 19. december 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá sosialu nevnd, um at heita á BHS at veita javnbjóðis tænastur í norðaru hálvu í Suðuroynni til borgarar 65+, har hesir borgarar fáa fyribyrgjandi viðlíkahaldsvenjingar» eins og í sunnaru hálvu. Og at útbúnaðurin, ið verður nýttur til venjingar er á sama støði, og at útbúnaðurin verður dagførdur, og at títtleikin til venjingar er eins í norðari hálvu, sum í sunnari hálvu.

**Kommunustjórin 09.03.2025:**
Forkv. í sosialu nevnd ynskir at nevndin umrøður tilboð um vælverjuvenjing hjá BHS:
*BHS hevur eitt tilboð til venjingar á norðaru helvt av Suðuroynni, samstundis sum trý tilboð til venjingar eru í sunnari helvt av Suðuroynni. TVK skipar sjálvt fyri vælveruvenjinga +65 í skúlahøllini í Trongisvági.*

**Sosiala nevnd 12. marts 2025:**
Einmælt samtykt at umboðini hjá Tvøroyrar kommunu taka málið upp á stýrisfundi í BHS, við áheitan um at BHS veitir javnbjóðis tænastur í norðaru hálvu í Suðuroynni til borgarar 65+. Mælt verður til at verandi venjingar í ítróttarhøllini í Trongisvági halda áfram, og at BHS átekur sær kostnaðin av hesum.
Og at útbúnaðurin, ið verður nýttur til venjingar er á sama støði, og at útbúnaðurin verður dagførdur, og at títtleikin til venjingar er eins í norðari hálvu, sum í sunnari hálvu.

**Sosiala nevnd 09. april 2025:**
Málið var umrøtt og kunna. Samb. Eyð Eidesgaard, stýrislimur í BHS, hevur stýrið fyri BHS ikki havt fund síðani málið var fyri í seinasta fundi í sosialu nevnd 12. mars. Forkv. mælir til at umsitingin orðar skriv til leiðsluna fyri BHS, við fráboðan um, at eldrafimleikurin, ið Tvøroyrar kommuna skipar fyri í Trongisvági, verður yvirtikin og skipaður av BHS, og at tað framyvir verður lýst við hesari tænastu saman við øðrum tilboðum hjá BHS. Forkv. mælir eisini til, at BHS heldur áfram við verandi skipan við verandi veitara. -Einmælt samtykt.

**Kommunustjórin 22.04.2025:**
Til kunningar er skriv og svar, sum umsitingin hevur sent til BHS, við áheitan samsv. samtykti hjá sosialunevnd.

**Sosiala nevnd 27. august 2025:**
Forkvinnan greiddi frá, at eldri borgarar møta týsdagar og hósdagar millum kl. 16.00–17.00 til rørslu í skúlanum í Trongisvági, sum er sera væl umtókt.

Mælt verður til, at BHS endurskoðar ætlanina, sum lýst er í fundarfragreiðingini, hvørt tænastan kann veitast á sama stað – *í auluni á Trongisvágsskúla* – og at verandi tíðir verða varðveittar. Mælt verður til, at umsitingin samskiftir við BHS beinanvegin, fyri at røkka tilmælinum, soleiðis at tænastan kann byrja í september sum vant. – Einmælt samtykt.

Eisini verður mælt til, at heimasíðan hjá TvK verður dagførd við einum teigi á forsíðuni, har sjónligu tænasturnar til borgarar 65+ verða savnaðar. – Einmælt samtykt.

**Sosiala nevnd 23. september 2025:**
Forkvinnan í sosialu nevnd fegnast um, at Bú- og heimatænastan hevur tikið avgerð um at uppgradera tilboðini til eldraborgarar við bústaði í norðara helvt av Suðuroy, soleiðis at hesi nú verða á jøvnum føti við tilboðini í sunnaru helvt.
Forkvinnan mælir til, at Tvøroyrar kommuna heldur fram við Vælverðuvenjing til 65+ í skúlahøllini í Trongisvági við verandi venjaratoymi, ið er væl vitja og til stóra gleði fyri eldri borgarar. -Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 26. september 2025:**
Borgarstjórin mælir til, at BHS «Bú- og heimatænastan» heldur fram við at kanna, hvørt tað ber til at skipa fyri Vælverðuvenjing til 65+, samsv. býráðssamtyktini hin 19. december 2024. Og at verandi skipan heldur áfram fyribils. -Einmælt samtykt.

**Býráðið 29. september 2025:**
Anita Vibergsdóttir mælir til, at verandi Vælveruvenjing 65+ í skúlahøllini í Trongisvági heldur áfram.
Atkvøtt verður um tilmælið hjá Anitu Vibergsdóttir.
Fyri atkvøddu: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Barbara Tausen, Eyð Eidesgaard, Bjarni Hammer og Arnfinn Bech.

Borgarstjórin mælir til, at tilmælið hjá Fíggjarnevndini 26. September 2025 verður tikið aftur. -Einmælt samtykt.

**67/25**
**25/00418-1 P/F Varðin Pelagic -"dagføring sep. 2025" av avtala um uppfylt sjóøkið til protein & lýsiverksmiðju**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 23.09.2025 | 21/25 |
| 2 Tekniska nevnd | 11.09.2025 | 26/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 77/25 |
| 4 Býráðið | 29.09.2025 | 67/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 04. Sep. 2025**
Tvøroyrar kommuna og P/F Varðin Pelagic (VP) hava í 2023 undirskrivað eina avtalu um víðkan av havnarøkinum. Avtalan fevnir m.a. um útfylling av sjóøki, makaskifti av økjum og nýtslurætt hjá VP.

Umsitingin mælir til at fremja tillagingar í avtaluni frá 2023 til nýggja avtalu sep. 2025, sum tekur hædd fyri broyttum og nágreinaðum viðurskiftum, bæði byggitekniskum og lógarkrøv.  -hetta eisini grunda á samtykt hjá Tvøroyrar býráð at varðveita fjøruna.

**Munir millum verandi "2023" og broyttu avtalu "sep. 2025":**

- **Gula økið: (kortskjal 606b og 607)**
    - *Verandi avtala (2023):* Gula økið verður lýst sum leiguøki til útbygging av virkisbygningi hjá VP.
    - *Broytta avtalan (2025):* Gula økið verður staðfest sum ogn hjá Tvøroyrar kommunu, og VP fær leigurætt.

- **Makaskifti (kortskjal 2):**
    - *Verandi avtala (2023):* VP fær økini 1, 4 og 5 (758 m²) í býti við økini 3, 6, 7 og 9 (769 m²).
    - *Broytta avtalan (2025):* VP fær økini 5 og 7 (404 m²) móti at lata frá sær øki 6 (498 m²). Hetta gevur kommununi greiðari ræði á økinum og minkar um víddina, ið VP fær.

- **Grøna økið:**
    - Í báðum avtalum verður grøna økið matrikkulerað og tinglýst sum ogn hjá VP, men við forkeypsrætt hjá kommununi.
    - Grøna økið er nýtt útfylt sjóøki, sum VP stendur fyri at gera byggibúgvið av, fyri egnum kostnað.

**Niðurstøða av broyttu avtaluni**

Í undirskrivaðu avtaluni frá 2023 fær P/F Varðin Pelagic økini 1, 4 og 5 við samlaðari vídd á 758 m², meðan Tvøroyrar kommuna fær økini 3, 6, 7 og 9 við samlaðari vídd á 769 m². Hetta makaskifti er grundað á eina javnbjóðis býti av økjum.

Í tí tillagaða uppskotinum frá 2025 verður makaskipanin tó broytt soleiðis, at P/F Varðin Pelagic fær økini 5 og 7 við samlaðari vídd á 404 m², meðan Tvøroyrar kommuna fær øki 6 við samlaðari vídd á 498 m². Hetta merkir, at Tvøroyrar kommuna stendur eftir við ein munandi størri part av lendi, og at luturin hjá P/F Varðan Pelagic verður samsvarandi minkaður.

Sostatt er grundreglan, at avtalan í 2023 hevði javnvág millum partarnar, meðan sep. 2025 avtalan er meira kommunuvinarligt og gevur Tvøroyrar kommunu ein størri fyrimun í lutfallinum av útskiftum økjum.

**Grundgeving fyri broyttu avtaluni er sostatt**

- Kommunan tryggjar sær framhaldandi ognarrætt á gula økinum, sum er víðkan av matr. 493b.
- Makaskiftið í broyttu avtaluni gevur Tvøroyrar kommunu meiri atgongd og betri ræði á lendinum enn í upprunaligu avtaluni.
- Byggiloyvið er longu latið VP, grundað á byggisamtykt fyri havnaøkið. Broytta avtalan er betur samsvarandi við verandi kommunalu skipanina og byggiloyvið.
- Grøna økið er nýtt útfylt øki, sum VP sjálvt stendur fyri at gera byggibúgvið. Kommunan selur sostatt ikki verandi fastogn, men skipar fyri, at økið kann matrikkulerast og tinglýsast eftir galdandi reglum.

**Tilgongd framyvir**

**Alment útboð.** *Avtala (2023):* Ásetir, at makaskifti fer fram sambært kunngerð nr. 122/2000. *Broytta avtalan (2025), e*r eisini tilpassað til galdandi lóggávu og leggur upp til, at kommunan søkir landsstýrismannin um undantak frá kravinum um alment útboð sambært § 2, stk. 2 í kunngerðini og § 44 í kommunustýrislógini.

- Broytta avtalan krevur góðkenning frá Tvøroyrar býráð.
- Kommunan skal senda umsókn til landsstýrismannin um undantak frá almennum útboði sambært § 2, stk. 2 í kunngerð nr. 122/2000, grundað á serligu viðurskiftini.
- Kortskjølini nr. 606b og 607 verða løgd við sum partur av málsviðgerðini.

**Tilvísing til:**
Mál 23/00384
Mál 24/00028

**Lógargrundarlag:**
- Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 22. mai 2023, §44, Føst ogn hjá kommununi
- Kunngerð nr. 122/2000 um alment útboð av kommunalari fastogn,

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmælið:**
Býráðið skal taka støðu til, um Tvøroyrar kommuna:

1. góðtekur broyttu avtaluna sum fyriliggjandi sep. 2025 við P/F Varðin Pelagic,
2. og samstundis samtykkja at søkja landsstýrismannin um undantak frá alment útboði sambært § 44 í kommunustýrislógini og § 2, stk. 2 í kunngerð nr. 122/2000.

Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið vinnu- & havnanevndini og býráðnum til støðutakan.

**Tekniska nevnd 11. september 2025:**
Nevndin tekur einmælt undir við tilmælinum frá umsitingini. Eyð Eidesgaard var ikki við í viðgerðini av hesum málinum.

**Vinnu- og havnanevndin 23. september 2025:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini. Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 26. september 2025:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd og Vinnu- og havnanevndini. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 29. september 2025:**
Atkvøtt verður um tilmælið hjá Teknisku nevnd, Vinnu- og havnanevndini og Fíggjarnevndini, at góðkenna broyttu avtaluna, sum fyriliggur, og at søkja landsstýrismannin um undantak frá almennum útboði sambært § 44 í kommunustýrislógini og § 2, stk. 2 í kunngerð nr. 122/2000.
**Fyri atkvøddu:** Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Barbara Tausen, Eyð Eidesgaard og Bjarni Hammer.
**Ímóti atkvøddu:** Arnfinn Bech.
Arnfinn Bech ynskir viðmerkt, at avtalan verður tíðaravmarkað, og at ognin fellur aftur til Tvøroyrar kommunu eftir t.d. 50 ár.

**68/25**
**25/00455-1 Jólaborðhald 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 101/25 |
| 2 Býráðið | 29.09.2025 | 68/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 23.09.2025**
Fleiri starvsfólk hava gjørt vart við ynskið um, at at kommuna aftur skipar fyri felags jólaborðhaldi fyri øllum starvsfólkum í kommununi.

Kommunan hevur ikki skipa fyri slíkum borðhaldi síðan 2019, orsakað av Korona farsóttini.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongin ávís játtan er avsett til slíkt tiltak. Mælt verður til at fíggja hetta við at veita eykajáttan til §114 "Fyrisiting"

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 26. september 2025:**
Einmælt samtykt at umsitingin skipar fyri felags jólaborðhaldi fyri øllum starvsfólkum í kommununi, og at hetta verður fíggja við eykajáttan til §114 "Fyrisiting" .

**Býráðið 29. september 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini at umsitingin skipar fyri felags jólaborðhaldi leygardagin tann 6. desember fyri øllum starvsfólkum í kommununi, og at hetta verður fíggja við eykajáttan til §114 "Fyrisiting".

**69/25**
**25/00459-1 Føroya Banki -dagføringar av partinum sum Føroya Banki leigar á matr.nr 374, á Sjógøtu 2, samsv. keypsavtalu (25/00135-7)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 105/25 |
| 2 Býráðið | 29.09.2025 | 69/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 25.09.2025**
Lisitationsfundur í Føroya Banka – 25. september 2025, kl. 15.00
Luttakarar á fundinum vóru:

- Fyri Tvøroyrar kommunu: borgarstjórin og kommunustjórin
- Fyri Føroya Banka: Eydis Kjærbo (deildarleiðari), Jensia Olsen, Rakul Borg Brattaberg og Rógvi Sveinsson
- Fyri BRIM arkitektar: Páll Lave og Jón Strømsten
- Fyri MTV byggivirkið: Mortan Vang og Sylvan Poulsen

Kristin Michelsen lat upp kuvertin við tilboðnum frá MTV byggivirkið, sum varð handað á fundinum.

BRIM arkitektar hava projekterað umbyggingar og dagføringar av tí partinum av bygninginum á Sjógøtu 2, sum Tvøroyrar kommuna hevur keypt frá Føroya Banka. Ein partur av keypsavtaluni er, at deildin hjá Føroya Banka skal dagførast.
Arbeiðið varð boðið út av BTIM sum innboðin høvuðsentreprisa til fýra arbeiðstakarar *(Hamar, Kiro-Smíð, CS-Hús og MTV Byggivirkið).* Til lisitatións fundin kom bert eitt tilboð inn, og tað var frá MTV Byggivirkið í Froðba.

Arbeiðið varð av BRIM mett at kosta kr. 3,3 mió. fyri uttan ventilatión. Tilboðið frá MTV ljóðar á kr. 4,8 mió., íroknað ventilatión fyri kr. 1,6 mió. *(Allir prísir eru ex. MVG)*

BRIM arkitektar eru í gongd við at nærlesa og greina tilboðið frá MTV.

**Í leigusáttmálanum er ásett:** *(Mál 25/00135-10)*
Útleigari (Tvøroyrar kommuna) skal høvuðsumvæla og innrætta leigaðu hølini.

Útleigari skal standa fyri arbeiðinum at høvuðsumvæla ognina. Tvs. øllum arbeiði, sum hoyrir til fastar installatiónir, so sum ventilatión, jarðhita, skifta vindeygu osfr. Tó skal leigari hoyrast í øllum, sum viðvíkur projektering og fyrireiking, og skulu báðir partar góðkenna projektið og møguligar seinni broytingar.

Høvuðsumvælingin við føstum installatiónum er mett at kosta 4.100.000,00 pluss mvg., og rinda útleigari og leigari hvør sína helvt av hesum kostnaði. Tvs. kr. 2.050.000,00 plus mvg í part. Leigarin rindar sín part av umvælingini til útleigara beinanvegin leigumálið tekur við.

**Gerst kostnaðurin hægri enn omanfyri mett, rindar leigarin hesa hækking. Ein møguligur minni kostnaður verður býttur í helvt millum útleigaran og leigaran.**

Leigarin kann eftir hetta fyri egnu rokning seta upp tílíkar innrættingar, sum hann heldur verða neyðugar til endamálið í nýtsluni av tí leigaða, og kann taka teir við sær, tá ið leigumálið heldur uppat, um hetta letur seg gera uttan skaða á tað leigaða.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Kostnaðurin av dagføring av matr.nr 374, verður fíggjaður við lántøku sum eykajáttan á FÆ2025 §609 "Bygningar løguframleiðsla" samsvarandi mál. (25/00189)

**Tilmælið:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at heimila umsitingini at taka av tilboðnum frá MTV byggivirkið, samsv. tilmælinum hjá BRIM ark. og at heimila umsitingini at arbeiða víðari -saman við BRIM ark.- at dagføra og umvæla eystara partin av bygninginum, soleiðis at hesin kann hýsa umsitingini hjá Tvøroyrar kommunu.

Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 26. september 2025:**
Fíggjarnevndin mælir einmælt til at taka av tilboðnum hjá BRIM ark., og at heimla umsitingini at arbeiða víðari -saman við BRIM ark.- at dagføra og umvæla eystara partin av bygninginum, soleiðis at hesin kann hýsa umsitingini hjá Tvøroyrar kommunu.

**Býráðið 29. september 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Fíggjarnevndini um at taka av tilboðnum, sum MTV Byggivirkið hevur latið inn sambært útboði frá BRIM Ark., og at heimila umsitingini at arbeiða víðari við ætlanini saman við BRIM Ark. um at umvæla eystara partin av bygninginum, soleiðis at hesin kann hýsa umsitingini hjá Tvøroyrar kommunu. Og at verkætlanin verður fíggja sum eykajáttan á FÆ2025, §609 "Bygningar løguframleiðsla".

## 70/25
## 25/00433-1 Læknamiðstøðin -dagføring/nýtt inbúgv

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 23.09.2025 | 35/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 103/25 |
| 3 Býráðið | 29.09.2025 | 70/25 |

**Málslýsing:**
**Kommunustjórin 16.09.2025**
Starvsfólkini í læknamiðstøðini hava gjørt vart við ynskið um dagføring av innbúgv.

> ***Innbúgv***. *-vit tosaðu um nýggj elevatións skrivaraborð. Talan er um trý nýggj borð. Tvey til læknarnar og eitt til nýsettan sjúkrarøktarfr. Hesi eru gomul og kunnu ikki eleverast, men serliga borðið hjá sjúkrarøktarfrr. er ikki hóskandi, og hevði veri sera gott at fingið nýtt borð sum skjótast.*
> ***Akuttrúm***. *-tosað hevur verði kommununi um umbygging/broyting av rúminum úteftir í ervað. Kommunan hava verið her og hugt eftir hølinum og hvørjar broytingar kunnu gerast. 1.august byrjaði nýggjur sjúkrarøktarfr., í starvi á læknamiðstøðini, ið ger at vit nú mangla hølir. Hon brúkar nú eini høli, sum áðrenn var akuttrúm. Sostatt er onki akuttrúm, og tað er nakað vit hava stóran tørv á.*
> *Nær kunnu vit vænta at hoyra meira ítøkiligt um umbygging/broytingar av hesum rúminum?*
> ***Heilsumiðstøð.*** *-hvørjar ætlaninir eru viðvíkjandi nýggju heilsumiðstøðini í miðbýnum? Nær fæst meira at vita hesum v.v.?*

**Lógargrundarlag:** Kunngerð um støðið, viðlíkahald, rakstur o.a. av viðtaluhølum hjá kommunulæknum, sum broytt við kunngerð nr. 19 frá 21. mars 2017

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2025 210, 14 kommunulæknin vørur & tænastur avsett kr. 323 tkr. -onkið avsett til íløgur.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan

**Sosiala nevnd 23. september 2025:**
Forkv. mælir til at heimila umsitingini at keypa 3. nýggj borð og stólar samsv. samsv. ynskjum og tørvi hjá starvsfólkunum, sum víst verður á í telduposti 17. sep. 2025. -fíggjingin verður játta av §210 -einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 26. september 2025:**
Fíggjarnevndin mælir einmælt til at heimila umsitingini at keypa 3. nýggj borð og stólar samsv. ynskjum og tørvi hjá starvsfólkunum, sum víst verður á í telduposti 17. sep. 2025. -fíggjingin verður játta av §210, sum eykajáttan. -Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 29. september 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Sosialu nevnd og Fíggjarnevndini, og at fíggjingin verður játta av §210, sum eykajáttan

**Til kunningar**

## 23/25
## 25/00029-1 Skattainntøkur 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.01.2025 | 4/25 |
| 2 Býráðið | 30.01.2025 | 1/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 24.02.2025 | 2/25 |
| 4 Býráðið | 27.02.2025 | 4/25 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.03.2025 | 3/25 |
| 6 Býráðið | 31.03.2025 | 7/25 |
| 7 Fíggjarnevndin | 25.04.2025 | 6/25 |
| 8 Býráðið | 01.05.2025 | 12/25 |
| 9 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 7/25 |
| 10 Býráðið | 02.06.2025 | 15/25 |
| 11 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 8/25 |
| 12 Býráðið | 29.09.2025 | 23/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 15.01.2025**
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2024/2025

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2025/2026

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til kunning og umrøðu.

**Fíggjarnevndin 2025-2028 23. januar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað.

TVØROYRAR KOMMUNA

**Býráðið 2025-2028 30. januar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 2025-2028 24. februar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 27. februar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 20. marts 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 31. marts 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 01. maj 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 26. maj 2025:**
Málið umrøtt og kunnað

**Býráðið 02. juni 2025:**
Málið umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 26. september 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 29. september 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

## 24/25
## 25/00189-1 TVK -endurskoðan av lánum hjá Tvøroyrar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 40/25 |
| 2 Býráðið | 02.06.2025 | 41/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 9/25 |
| 4 Býráðið | 29.09.2025 | 24/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 04.05.2025**
Umsitingin er í einari tilgongd at endurskoða lán hjá Tvøroyrar kommunu, og hevur í hesum sambandi móttikið tilboð frá banka við kunning/tilboð um endurfíggjaðan av lánum.

Umfígging og lántøka, 2025 - lántøka mai 2025, frágreiðing um málið:
Vísandi býráðssamtykt 1. mai 2025, -viðv. mál um lántøku (25/00135 "Keyp av ognar partinum hjá Føroya Banka av matr. nr 374, á Sjógøtu 2")- verður hervið heitt á fíggjarnevnd og býráð um at umsitingin fær heimild at taka lán upp á kr. 15 mió. til keyp og fígging av umbygging av bygninginum á Sjógøtu 2, umframt til at fremja ætlaðu broyting á kringøkinum 373b, samsv. uppskotið hjá BRIM ark.

Myndugleikagóðkenning: Av tí at skuldin er niðanfyri álíkningina, er ikki neyðugt at innheinta formalia og loyvir mótvegis landsstýrinum ísbv. lántøkuna.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 43. Til lántøku, veðsetan, nýtslu av rakstraravlopi og tílíkum krevst samtykt frá kommunustýrinum. Stk. 2. Er nettoskuldin meira enn ein álíkning eftir einum av landsstýrismanninum árliga ásettum skattaprosenti, krevst loyvi frá landsstýrismanninum til lántøku og til broytingar í lántitreytunum

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Lántøkan upp á 15 mió.kr. fer til keyp og fígging av umbygging av bygninginum á Sjógøtu 2, umframt til at fremja ætlaðu broyting á kringøkinum 373b, samsv. uppskotið hjá BRIM ark.

**Tilmælið:**
Mælt verður til, at fíggjarnevndin og býráðið geva umsitingini heimild at taka upp lán á kr. 15 mió., og heimild at arbeiða víðari við lántøku, ið gevur tað lægstu rentuna og lagaligastu fíggjanveitingina.

Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 26. maj 2025:**
Einmælt samtykt at heimila umsitingini at upptaka lán upp til kr. 15. mió samsv. tilmælið.

**Býráðið 02. juni 2025:**
Einmælt samtykt til mælið hjá fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevndin 26. september 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 29. september 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**25/25**
**25/00419-3 Djóralækni -SP.F tín Djóralækni søkir um hølir**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 87/25 |
| 2 Býráðið | 29.09.2025 | 25/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 05.09.2025**
Umsitingin hevur móttikið fyrisp. frá djóralækna, sum ynskir at veita tænastur í Suðuroynni.

**Fyrisp. ljóðar.:**

> *Vit eru ein nýggj djóralæknafyritøka, sum bjóðar heimavitjanir og -viðgerðir. Vit halda til á Argjum. Vit byrja sum útikoyrandi djóralæknar, og ætlanin er seinni at byggja eina djóralæknaklinik í okkara egnu húsum, sum vit skulu byggja Við Klingurstjørn á Argjum. Vit ynskja, at røkka longri út enn har tað er landfast og vilja fegin eisini geva suðringum møguleikan fyri at koma til djóralækna við sínum djórum.*
> *Ætlanin er at koma til Suðuroynna* ***í vikuskiftum, vónandi hvønn ella annan hvønn mánað, alt eftir tørvinum****. Vit kunnu bjóða heilsukanningar, koppsetingar, og bæði medisinskar viðgerðir og skurðviðgerðir.*
> *Vit skriva til tykkum í vón um, at Tvøroyrar Kommuna kundi hjálpt okkum at finna eitt høli, vit kundu brúkt, tá vit koma suður? Vit hava ikki tørv á so nógvum - tað týdningarmesta er, at djórini kunnu vera har, og at har er ljós, vatn og streymur.*

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 26. september 2025:**
Fíggjarnevndin mælir einmælt til at Tín Djóralækni fær innivist í tænastubygninginum á havnalagnum, fyribils fram til 1. mars 2026. Gjaldið verður verður kr. 1.000,- fyri dagin, og avtalan verður tikin upp til nýggja viðgerð í fíggjarnevndini fyrst í komandi ári.

**Býráðið 29. september 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

## 26/25
## 25/00450-1 Kunningarferð til Noregs - oktober 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 97/25 |
| 2 Býráðið | 29.09.2025 | 26/25 |

**Málslýsing:**
Ferðin skal geva íblástur til menning av einari størri verkætlan í Tvøroyrar Kommunu, sum kann geva eitt íkast til náttúru- og frítíðartilboðini hjá kommununi og samstundis draga ferðafólk til, í tráð við altjóða krøv um burðardygga ferðavinnumenning.

Vitjað verður hjá samstarvsfelag í Noreg, sum skipar fyri kunning og rundvísing. Vit síggja dømi um ymiskt væleydna og vitja støð á hvørjum ári. Kannað verður hvussu framtíðar verkætlanir kunnu skipast og fremjast her á Tvøroyri.

Ætlanin er ma. at vitja á Ulriken í Bergen –,sum er vorðin eitt av mest vitjaðu frítíðarstøðum í Noregi, við meira enn 500.000 vitjandi árliga.
.

Luttakarar á ferðini: Borgarstjórin, kommunustjórin og starvsfólk á Teknisku deild

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Uml. 30.000 kr

**Tilmælið:**
At fíggjarnevndin játtar pening til ferðina, soleiðis at tilfar kann fyrireikast til eitt væl grundað uppskot um eina komandi verkætlan, sum styrkir um leiðina hjá kommununi sum eitt stað, har náttúra, mentanararv og burðardygg ferðavinna ganga hond í hond.

**Fíggjarnevndin 26. september 2025:**
Fíggjarnevndin mælir einmælt til at heimila umsitingini at vitja í Noreg samsv. ferðaskrá, og at hetta verður fíggja av §516 Vitjanir og umboðan.

**Býráðið 29. september 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

Fundurin lokin kl. 19:25

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Barbara Michalina Tausen

Bjarni Hammer

Eyð Jóna Eidesgaard

Arnfinn Bech